# ARBEIÐSMARKNAÐUR
## á www.portal.fo

Leys størv, sum verða lýst í Sosialinum, kunnu leggjast út á
www.portal.fo
so øll hava møguleikan at síggja lýsingina

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

2 lýsingar = -20% í avsláttri
3 ella fleiri = -30% í avsláttri




Sosialurin




# - Hetta høvdu vit ikki væntað



*- Hetta er eitt super tiltak, sum er virkuliga væl fyriskipað. Tað einasta keðiliga við Gospel Prix er, at tað er ein kapping. Men eitt er at minnast til, at tað eru eingir taparir, segði Birgir Sigurðsson eftir sigurin í Gospel 2003*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Eftir at vinnarin í Gospel Prix 2003 var kunngjørdur, var tað ein kátur Birgir Sigurðsson, sum vit fingu orðið á. Hann er nevniliga frontfigurur í vinnarabólkinum I AM, og var tískil sera glaður um sigurin**

GOSPEL PRIX
*Henny Olsen*

- Hetta høvdu vit als ikki væntað. Vit vónaðu at enda á 2. ella 3. plássinum, so tá vit hoyrdu at Direct Level gjørdist nummar 2, so vóru vit næstan vísir í, at Braquet vann, og vit gjørdust nummar 3 ella 4.

Soleiðis greiður ein ovurkátur Birgir Sigurðsson frá, tá vit, eftir at úrslitið var kunngjørt, hittu hann og fingu eitt lítið prát. Hann hevði, sum skilst, ikki væntað at enda ovast, men sum við mongum øðrum, so veit man ongantíð.

I AM hava spælt saman líka síðani 1996, men við tíðini hava teir skift fólk út. Teir hava verið á ørgrynnu av festivalum og konsertum, og teir hava verið við í Prix Føroyar- finaluni, sum teir tó ikki megnaðu at vinna. So hvussu tað var at vinna eftir at hava spælt saman í 7 ár, er so stóri spurningur.

- Tað var rættiliga undarligt endiliga at vinna okkurt. Men kortini var tað herligt, og kanska fyri at siga uppá tíðina. Hetta trongdu vit veruliga til, sigur Birgir.

## Gott tiltak

Um tiltakið hevur Birgir næstan bara positiv ting at nevna.

- Hetta er eitt super tiltak, sum er virkuliga væl fyriskipað. Tað einasta keðiliga við Gospel Prix er, at tað er ein kapping. Men eitt er at minnast til, at tað eru eingir taparir. Allir bólkarnir hava verið knasandi góðir, og tað hevur óivað verið sera torført hjá dómarunum at finna vinnaran.

Spurdur, um hví Birgir heldur, at teir vunnu, sigur hann, at teir hava lagt stóran dent á tað visionella og eisini á viðspælið. Hann sigur, at teir høvdu nógv fjas aftanfyri, og hetta heldur hann hava gjørt munin.

I AM vann sær í Gspel Prix 2003 eina uttanlandaferð til ein festival, men enn er ikki avgjørt, hvør festivalur tad verður. Men nokk hava teir at síggja til. I AM kemur í næsta mánaði út vid eini útgávu við egnum tilfari. Hetta verdur næsta fløgan, id I AM gevur út. Tann fyrra var í 1999.

Eftir er bert at ynskja Birgiri Sigurdsson tillukku vid sigrinum, og ikki minst góða eydnu í framtíðini. Men hetta er eisini galdandi fyri hinar bólkarnar, tí vit hava fingið staðfest, at eingir taparir eru.


# Heimskend í Føroyum!
## Fá tína mynd á talutíðarkort hjá Kalli

Vinn **5.000 kr.** fartelefon ella myndatól




SANSIR TEL 355 355

### Ver við í kappingini um nógvar góðar vinningar

Vilt tú fáa tína mynd á talutíðarkort hjá Kalli? So tak eina mynd, framkalla hana, og send negativið av myndini í einum brævbjálva til:

**Fotobúðin - Handilskjarnin**
**Boks 1016, 110 Tórshavn**

Á henda brævbjálva skal navn, bústaður og telefonnummar skrivast, so vit kunnu fáa fatur á tær, hevur tú vunnið. So ert tú við í kappingini um at fáa tína mynd á talutíðarkort hjá Kalli.

Eisini ert tú við í kappingini um:
1. **virðisløn:** 5.000,- kr. frá Kalli
2. **virðisløn:** Nokia 2100 við Frælsi haldi frá Kalli
3. **virðisløn:** Myndatól frá Fotobúðini

Øll kunnu vera við at avgera, hvør skal vinna, við at fara inn á www.kall.fo og atkvøða fyri bestu myndini.

Kappingin varir til 24. oktobur, so skunda tær at senda myndina inn.

**www.kall.fo**

*Kall tilskilar sær rættin til frítt at nýta innkommu myndirnar á talutíðarkortunum, lýsingar við hesum kortum, at leggja tær á heimasíðuna og at nýta tær í sambandi umrøðu av kappingini í fjølmiðlum. Eisini tilskilar Kall sær rætt til ikki at leggja allar myndir á heimasíðuna.*

fotobúðin Handilskjarnin

kall *Orðið er títt*

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Faks 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo